ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv. ft.

# Útróðrarbátur og fiskiútgerð v.m. til sølu

Vegna Sp/f Løkin undir konkurs verður útróðrarbáturin "Klettur", FD 322, hervið lýstur til sølu.

Báturin er ein plasttrevjabátur frá 1989, Marinplast. Longd 8,950m, breidd 3,100m, dýpd 1,150m. Motorurin er ein Volvo Penta á 95,68Kw.

"Klettur" hevur í fiskiárinum 2010/2011 rætt til fiskiloyvi í bólki B5, sum er felagskvota uppá 5.304 fiskidagar á innaru fiskidagaleið

Til bátin hoyra 5 DNG snellur, Íslandsrulla, 4 kør til fisk, boyðulyktir, egningartrakt, autopilot, VHF Sailor, lit ekkolodd, GPS Koden, Pioneer bilradio, Storno telefon, pulvur eldsløkkjari, gass- og olju kabyss og Viking bjargingarbátur til 6 persónar.

Av fiskiútgerð eru 45 línur, 39 toskalínur og 9 kalvalínur, umframt ein trakt og onnur útgerð, um hóskandi boð fæst.

Frystarí verður eisini selt, talan er um frystarí av merkinum Zanotti til uml. 35-40 stampar.

**Fleiri upplýsingar um bátin fáast við at venda sær til:**
Eyðbjørn Larsen, advokat, við at ringja á tlf. 35 33 35 ella við telduposti til eyl@jura.fo, ella til skrivaran, Margit S. Jørgensen, msj@jura.fo."

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv. ft.

# Bilur til sølu

Vegna Sp/f Løkin undir konkurs verður ein vøruvognur hervið lýstur til sølu.

Talan er um ein hvítan vøruvogn av merkinum Toyota Hi-Ace, diesel, árg. 06/1998, ið hevur koyrt 82.500km.

**Fleiri upplýsingar um bátin fáast við at venda sær til:**
Eyðbjørn Larsen, advokat, við at ringja á tlf. 35 33 35 ella við telduposti til eyl@jura.fo, ella til skrivaran, Margit S. Jørgensen, msj@jura.fo.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TEL 35 33 35 · FAX: 35 33 36 · WWW.JURA.FO




Sethús | Virkisbygningar | Umvælingar | Seruppgávur

# Búsetur søkir eftir skrivstovulærlingi

Søkt verður eftir lærlingi til skrivstovuna/bókhaldið, sum er í Tórshavn at byrja 2. januar 2011.
Hjá Búsetur eru vit 40 starvsfólk, sum arbeiða í einum jaligum og vælskipaum umhvørvi. Vit brúka nýmótans telduskipanir sum t.d. Navision Attain, LøttLøn og Microsoft forrit.

**Vit ynskja, at tú:**

- hevur FHS ella HH
- dugir vanliga handilsrokning og at skriva føroyskt
- hevur góð samstarvsevnir
- ert fleksibul
- ert fyrikomandi og ágrýtin

Sum skrivstovulærlingur kemur tú at møta fjølbroyttum avbjóðingum og at læra skrivstovu- og bókhaldsarbeiði.
Send tína umsókn við CV og avritum av viðkomandi skjølum **innan 5. desember til:**

**Búsetur spf**, Box 2100, 165 Argir
ella til durita@busetur.fo

Tú kanst fáa meiri at vita um størvini við at venda tær til Duritu Djurholm á durita@busetur.fo
ella tlf 355830/230833.

BÚSETUR
Tel 355 830 | www.busetur.fo

# Reingerðarfólk til Vestmanna Kommunu

Søkt verður eftir tveimum reingerðarfólkum til Vestmanna Kommunu at byrja 3. januar 2011.

Annað starvið umfatar dagliga reingerð á skúlanum, umframt høvuðsreingerð eina ferð um árið. Vetrarhálvuna verður harumframt gjørt reint um kvøldi 3. hvørja viku.
Arbeiðstíðin er uml. 17 tímar um vikuna.

Hitt starvið umfatar dagliga reingerð í dagstovninum Gjáarlon, umframt høvuðsreingerð eina ferð um árið.
Arbeiðstíðin er 12½ tíma um vikuna.

Størvini eru lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag.

Meira fæst at vita um størvini við at ringja til Hervør Johansen á tlf. 770 199.

Skrivlig umsókn skal vera Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi mikudagin 1. desember 2010 kl. 12.

**Vestmanna Kommuna**
**Bakkavegur 16**
**Postboks 91**
**355 Vestmanna**

**Dagstovnurin Korndalsgarður**
Foravegur 11, 470 Eiði, tlf. 473588 og 210588

# Pedagogar til Barnagarðin Korndalsgarð á Eiði

Barnagarðurin Korndalsgarður søkir eftir pedagogum, ein at byrja 1. januar 2011 og fimm at byrja 1. februar 2011. Arbeiðstíðirnar eru 20 til 32 tímar um vikuna.
Í Korndalsgarði eru fýra stovur, ein vøggustova, ein smábarnastova, ein barnagarðsstova og ein frítíðarstova. Stovnurin er vanliga opin frá kl. 7.00 til kl. 17.00.
Vit hava góðar umstøður bæði uttandura og innandura.

**Okkara ynski er at:**

- tú hevur góð samstarvsevni
- tú ert opin, erlig og fyrikomandi
- tú hevur áræði at geva børnunum avbjóðingar í gerandisdegnum
- tú vil vera við til at mynda og menna okkara pedagogiska arbeiði á stovninum
- tú kann arbeiða sjálvstøðugt, tekur ábyrgd og ert nærverandi
- tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroytttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrum og starvsfeløgunum.
- tú ynskir at menna teg fakliga og verða við til at mynda stovnin
- tú hevur teldukunnleika á byrjunarstøði

**Lønarviðurskifti:**
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag og fylgir lønarstigunum frá 11 – 18.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving og royndum og møguliga viðmælum skulu vera Korndalsgarði, Foravegur 11, 470 Eiði, í seinasta lagi 06. desember 2010, kl. 12
Um ikki nóg nógvir pedagogar søkja, verða hjálparfólk sett í fyribilsstørv.

*Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Unn Eldevig Petersen, leiðara á tlf. 210588*

# Matseðil

Hósdagin 18. november
**Rivjasteik / Bollar í karry**

Fríggjadagin 19. november
**Fiskafrikadellir / Stoktur medistari / Lasagna**

Leygardagin 20. november
**Heilstokt svínalundir**

Mánadagin 22. november
**Stokt flesk / Forlorin hara**

Týsdagin 23. november
**Salta neytakjøt / Roykt medistari**

Mikudagin 24. november
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellir**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**